ítróttur

Nr. 170 • mikudagur • 8. september 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Nú fær Helgi kjansin

**4th Klaksvík International byrjar 16. septembur og vónirnar fyri normum eru kanska bjartari enn nakrantíð. 15 ára gamli Helgi Dam Ziska er spentur til avbjóðingina**

ALTJÓÐA TALVKAPPING

*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*



*Hóast hann bara er 15 ár, so hevur Helgi Dam Ziska higarti lvunnið FM í snartalvi tvær ferðir. Verið unglingameistari eina ferð. Og hartil hevur hann eisini ognað sær IM-norm, tá hann gjørdi bart og vann stóru kappingina í Suðuroy*



*Hans Kristian Simonsen hevði eina minni góða kapping, tá NM var á skránni, men í Klaksvík leitar hann eftir sínum næsta IM-normi*

Tíggjunda altjóða kappingin í Føroyum fer av bakkastokki 16. septembur. Talan er um 4th Klaksvík International. Tað var Rani Nolsøe, sum saman við góðari hjálp frá serliga Mogens Nielsen, legði lunnar undir tí eftirhondini siðvondu talvkappingini.

Umframt kappingarnar í Klaksvík, hava føroyskir topptelvarar havt fleiri aðrar spennandi avbjóðingar og møguleikar at gera seg altjóða galdandi í heimlandinum. Eitt nú varð Landsliðsbólkurin í FM 2003 ein blandingur av útlendskum tittultelvarum og føroya sterkastu telvarum. Og Suðuroyggin er nú vorðin karmur um eina altjóða kapping, sum eftir øllum at døma verður afturvendandi. Í 2006 verður 2nd Suðuroy International leikt í Vági.

### Søguligur normur á Tvøroyri

Fyrsta altjóða kappingin í Føroyum, har møguleiki var at vinna sær normar, varð telvað í Útvarpshøllini í 1986. Men vit skulu tó heilt fram til 1st Suðuroy International í juni í ár, fyri at fáa fyrsta føroyska altjóða meistaranorm (IM-norm) á føroyskari jørð. Hetta hendi tá Hans Kristian ognaði sær ein norm, umframt at verða vinnari av kappingini. Tí er normurin hjá Hans Kristiani á Tvøroyri søguligur.

Flóvin Tór Næs (3 normar), John Arni Nielsen (2), Heini Olsen (1) og Helgi D. Ziska (1) hava allir vunnið sær normar uttanlanda.

Undantikið normin hjá Hans Kristiani á Tvøroyri, hevur eingin føroyingur enn verið serliga tætt við í hinum altjóða kappingunum í Føroyum. Tí var fyriskiparin av flestu altjóða kappingunum seinastu árini, Rani Nolsøe, sera fegin um úrslitið hjá Hans Kristiani.

### Tey trý h´ini

Føroyingarnir sum sleppa at royna seg í 4th Klaksvík International verða Heini Olsen, Hans Kristian Simonsen og Helgi D. Ziska. Umframt at hava forstavin h til felags, hava allir ognað sær ein norm í part. Heini vann sær sín fyrsta norm í januar 2004, tá hann vann eina kapping í Oslo. Hans Kristian ognaði sær sín fyrsta norm sum kunnugt á Tvøroyri, á sjálvari Jóansøku, meðan Helgi hevur tann feskasta normin av teimum trimum, nevnliga frá Politiken Cup seinast í juli.

### Helgi hevur góðar vónir

Serliga áhugavert verður at fylgja Helga í Klaksvík. Helgi er einans 15 ár, men hevur longu vunnið FM í snartalvi tvær ferðir, varð unglingaføroyameistaraska pin í 2004, fekk deilt 3. pláss í FM 2005 og hevur ein altjóða meistaranorm í skjáttuni. Alt innan hálvtannað ár. Øgilig og óhoyrd úrslit fyri ein so ungan mann.

Vit hava spurt Helga hvørjar vónir hann hevur, nú hann av álvara sleppur at royna seg í altjóða kapping.

- Jú, vónirnar hjá mær eru sum heild góðar. Eg havi fyrireikað meg seinastu tíðina og havi eitt nú hugt at mótstøðumonnunum. Endi eg onkrastaði mítt í, verði eg nøgdur, sigur Helgi.

Í fyrireikingini hevur Helgi higartil lagt mestan dentin á byrjanarspæl.

- Byrjanarspæl havi eg altíð studerað nógv og tað fari eg eisini at leggja meg eftir í fyrireikingini til 4th Klaksvík International. Men eg fylgi eisini væl við altjóða sterkum kappingum og taki til dømis flestu talvini hjá teimum sterku ígjøgnum. Tað gevur íblástur, sigur Helgi.

Helgi hevur sum sagt havt eina óhoyrda framgongd í seinastuni.

- Eg eri stórliga ovfarin av mínum egnu úrslitum seinasta árið. Hóast normurin í Keypmannahavn í summar sjálvandi hevur givið mær eyka sjálvsálit, hugsi eg ikki beinleiðis um at fara eftir normi og kappingarsigri í Klaksvík. Fyrst og fremst gleði eg meg at sleppa at telva aftur, sigur Helgi at enda.

Í komandi viku fara vit at hyggja nærri at hinum føroysku umboðunum og útlendsku luttakaranum.

## FAKTA

Altjóða kappingar í Føroyum:
(Við møguleikum fyri normum)

1986: IM-kapping í Útvarpshøllini.
1987: NM fyri einstaklingar, Tórshavn.
1997: Visa-Nordic kappingin, Tórshavn.
2000: 1st Tórshavn International, Tórshavn.
2002: 1st Klaksvík International, Viðareiði.
2003: FM Landsliðsbólkurin, Tórshavn.
2003: 2nd Klaksvík International, Klaksvík.
2004: 3th Klaksvík International, Klaksvík.
2005: 1st Suðuroy International, Tvøroyri.
2005: 4th Klaksvík International, Klaksvík.

## Dómaraskeið um vikuskiftið

Sum liður í fyrireikingunum til komandi kappingarárið, skipar Hondbóltsdómarafelagið fyri skeiðið um vikuskiftið

Aftur í ár er tað danski Frank Smith, sum kemur upp at halda skeið fyri føroyingunum.

Hann kemur til landið fríggjadagin, og leygardagin verður so skipað fyri lítlari kapping fyri bæði menn og kvinnur.

Kvinnurnar byrja kl. 9, og verða tað liðini hjá Kyndli, Neistanum og VÍF, sum fara at spæla. Kl. 12 fara so mansliðini hjá Kyndli, KÍF og H71 undir sínar dystir.

Ætlanin við hesum er so eisini, at dómararnir fáa nakrar dystir, og at Frank Smith síðani skal eftirmeta avrikini, eins og hann helst skal kunna geva nøkur góð ráð um, hvar dómararnir kunnu betra seg.

**-mørk**

## Dómarar Jolla sær framvegis

Føroya Bjór og føroyska hondbóltsdómarafelagið hava longt um sponsorsáttmálan, sum varð gjørdur undan kappingini í fjør.

Upprunaliga var talan um eitt-ára sáttmála, og hendan hava báðir partar helst verið nøgdir við. Somikið nøgdir, at sáttmálin nú er longdur í tvey ár.

Um dómararnir so bara at Jolla sær, ella um teir nú eisini kunnu fáa sær eitt sindur av Sisu, sum Føroya Bjór eisini framleiðir, verður tó ikki upplýst.

**-mørk**